Minningarorð um

Regin Henriksen, Sørvágur

f. 6. mai 1980 – d. 14. mai 2000

Brádliga bórust boðini um bygdina, Regin hjá Dalla varð deyður. Bert 21 ára gamal.

Soleiðis byrjaðu minningarorðini um beiggja okkara, sum doyði í 1977.

Aftur í dag standa vit hjálparleys og spyrjandi: Hví Regin okkara Regin! Ja, tað vardi meg ei, at tað kundi henda enn einaferð.

Mín hugur er hjá tær Rannvá góða, og mangur man standa spyrjandi, hví lagnan kann verða so hørð við nøkur, men einki svar vit finna. Fyrst tín tvillingsbeiggi og nú tykkar høgt elskaði sonur, sum eisini fekk navnið Regin. Bert 20 ára gamal.

Nú fýra mánaðir eru farnir, grætur hjarta mítt enn. Mínir tankar eru hjá tykkum øllum góða Rannvá, Jákup, Beinta og Dánjal. Tit hava mist eitt tað dýrabarasta, tit áttu.

Regin var ein sera góður og stillur drongur, og var hann til stóra gleði fyri tykkum og okkum øll, hesa alt ov stuttu tíð, honum untist at liva. Hugur mín leitar eisini til tín góða manna og Jóhannes abban.

Tað vóru sera tung boð at frætta, at tú, Regin góði, ikki var ímllum okkum meira, bert eina viku eftir, at tú hevði hildið tín 20 ára føðingardag. Tú vart so glaður fyri dagin, sum mamma tín hevði givið tær, og vit høvdu tað sera hugnaligt, men at vit ikki skuldu síggjast aftur, mostur og tú, er ikki til at skilja. Longsulin eftir tær góði er nívandi, og so tað, at hugsa um tíni kæru, sum eftir sita.

Nú Regin er farin, er mangt og hvat at minnast aftur.

Tað, sum sermerkti Regin var hansara stilla og tolna lyndi. Altíð góðsligur og trúfastur. Hesir eginleikar góvu honum nógvar góðar vinir, sum so sára sakna hann í dag.

Eftir at Regin hevði fingið prógv í 10. flokki, fór hann sum mangur annar unglingi til skips. Sigldi trúfastur 2 ár við djúpvatnstrolaranum »Vesturskini«. Tað kom skjótt til sjóndar, at Regin hevði góða sjónatúr og var nærlagdur og álítandi í arbeiði sínum.

Regin legði framtíðarætlanir sínar og valdi at fylgja fótasporum faðirs síns, og fór í smiðjulæru hjá J. K. Joensen í Miðvági. Hetta var eitt yrki, sum hann hevði stóran tokka og hegni til og eitt arbeiðspláss, sum hann var sera glaður fyri.

Saknurin er so stórur eftir teg góði. Eg tori næstan ikki at ímynda mær tað tómrúm, sum er í gerandisdegnum hjá tykkum í Sørvági, men eitt er vist, at tit eiga góð og rík minnir eftir Regin.

Vita skulu tit Rannvá og Jákup og systkini, at tað eru mong, sum hugsa um tykkum og taka lut í sorg tykkara.

Má Harrin styrkja tykkum í hesi sváru sorgartíð.

Æra verður minnið um Regin.

Mostur

Eg vil loyva mær at enda við sanginum sum omma Regin, Brynhild hevur yrkt:

Eydna góð á fold varð givin
mær at ognast heimið gott,
har, hvar góðsemja og blídni
altíð hava valdið átt.

Faðir móðir væl meg vardu
hildu allar sorgir vekk,
so at eg, ta tíð eg livdi,
sum á blómugøtu gekk.

Tit í Harrans hús meg bóru,
lærdu meg at kenna Gud,
og at tann, sum trýr á Jesus,
fær í himli góðan lut.

Tí var lív mítt her ein gleði,
Tryggheit, friður fylgdi mær,
til nú Harrin heim meg kallar,
tí mítt lívsskeið runnið var.

Ongin veit, hvat lívið bjóðar;
kanska fekk eg besta lut,
tí at eg á ungum aldri
sloppin eri heim til Gud.

Deyðans myrkur skjótt fær enda,
og eg síggi dagin, tí
fyri mær ein nýggjur heimur
bíðar aftan fyri ský.

Viðmerking:

Opið bræv til Tórshavnar Býráð

Halló allir býráðslimir.
Nú stundar til kommunuval. Hóast at tað allarhelst kemur óvart á tykkum, so ivast vit onga løtu í, at tit eru glað um hesi boðini tit nú fáa frá okkum: **” SURPRISE ! Vit í Foreldrafelagnum ætla fram til valið hvørja viku alment at eftirmeta avrik tykkara á barnaansingarøkinum. Og hví fara vit at gera tað? Jú - tí at hesuferð skal bamaansingin ikki bara verða valagn !!”**

Hatta vóru tey góðu tíðindini. Tey ringu tíðindini eru – og lat tað verða sagt beinanvegin - tað sær ikki for gott út hjá tykkum.

Hvørja viku fram til valið skulu vit ymsar síður av barnaansingartrupulleikanum, og í dag skulu vit hyggja nærri at **bíðilistunum.**

Afturlítandi ber til at siga, at aftaná eitt áhaldandi trýst frá foreldrum og Foreldrafelagnum, ásannaðu tit til endans, at ikki komst uttanum at fáa nakrar almennar og objektivar reglur fyri hvussu børn skuldu sleppa av bíðilistanum og inn á stovnarnar. Tit kundu ikki í longdini liva við eini rúgvu av frustreraðum og illum borgarum, sum øll fortaldu og hoyrdu søgur um hvussu ein skuldi gera yvirfyri býráðnum fyri at fáa sítt barn inn á stovn. Tað var nokk meiri av møði enn føði, at tit komu til ta ásannina.

Ásettar vórðu meginreglur um bíðilistan, upptøkutreytir og hvussu býráðið skuldi kunnað foreldrini um hetta. Vónir vóru fyri, at nú fór at ganga betri við hesi tænastu mótvegis borgarunum – men gakk – har hendi einki. Grundgeving býráðsins var tann, at reglurnar ikki kundu takast í brúk fyrr enn eitt serligt telduforrit varð útvegað. Býráðið trúði vónandi ikki uppá eina tekniska loysn á barnaansingartrupulleikanum?

Bíðað varð í einum blandingi av tolni og spenningi, og dagurin upprann eisini, tá ið telduforritið varð tikið í nýtslu. Tað var beint undan summarfrítíðini í ár, og tað merkti, at tá ið børnini hesaferð (summarið 2000) skuldu takast inn á stovn, so var tað við hjálp av m.a. hesum telduforriti.

Men vit foreldur og borgarar í Havn sóu ongan mun á mannagongdini, tí at hugburður býráðsins til barnaansingartrupulleikan var einki broyttur – gomul vøra í nýggjum pakkitilfari. Tí hvat varð gjørt á hesum sinni? Akkurát tað sama sum undanfarin ár.

Í ”nattens mulm og mørke” vóru brøv send út til tey foreldur, sum høvdu fingið børn síni inn á stovn. Hini – t.v.s. øll tey, ið einki bræv fingu – løgdu annaðhvørt postmannin undir at hava forkomið brævinum frá býráðnum (býráðið hevði jú lovað at hesuferð var heilt víst, at barnið slapp inn) – ella roknaðu tey út (einki bræv = einki pláss) at ei heldur hesaferð varð nakað pláss til Lítla palleba ella Lítlu marsonnu.

Og hvat gjørdu vit foreldur so? Jú annaðhvørt ringdu ella fóru omaná býráðið fyri at fáa uppklárað hvat var hent. Men har var eingin at hitta vegna summarferiu. Ei heldur á hesum sinni hevði býráðið dirvi at møta sínum borgarum, tá ið mest brúk var fyri tí.

Hvat var í vegin hjá býráðnum fyri at kunna borgarar sínar, soleiðs at sleppast kundi undan óvissuni og harvið eisini illum og frustreraðum borgarum? Tær nýggju reglurnar ásettu at tað skuldi gerast. Tað kundi verið lýst í bløðum, útvarpi, heimasíðuni hjá Býráðnum og einhvør – óansæð um børnini sluppu inn ella ei – átti at fingið eitt bræv við eini persónligari kunning um júst teirra støðu. Á tann hátt hevði býráðið sloppið undan at altíð at skulla hopa aftur eftir hali undan sínum borgarum.

Neyðarbrævið, sum býráðið hóast alt aftaná sendi til øll, ið eru uppskrivaði á bíðilista, um at børnini sleppa inn á stovn í august 2001 ella 2002, er ein rein undanførðsla. Tí útsøgnirnar í brøvunum, eru ikki knýttar at veruleikanum, men er heldur eitt úrslit av telduforritinum og umboða ynskitankar.

Tað er ikki nokk hjá býráðnum at staðfesta, aftaná at hava vitja eina oljuráðstevnu í Stavanger, at ein komandi oljuvinna fer at seta krøv til kommunur um eitt nú eina góða barnaansing, og síðani koma heim og vóna at trupulleikin loysir seg av sær sjálvum.

Kanska er orsøkin tann einfalda, at býráðnum væntar førleika og dirvi til at loysa trupulleikan umframt ein politikk á økinum – ein politikk, ið verður gjøgnumførdur í verki.

Men fallið ikki í fátt góðu býráðslimir! Vit í Foreldrafelagnum skulu nokk áhaldandi minna tykkum á uppgávuna, sum er sera einføld: ”Loysið ansingartrupulleikan eina ferð med alla”.

Hetta var tað vit høvdu at frambera í hesum umfari - „We’ll meet again“

Høgni í Stórustovu
Vinarliga Foreldrafelagið

P.s. Í næstu viku ætla vit at fara at hyggja nærri at avgerð tykkara um discountbarnaansingina, sum tit á ótrúligan hátt hava rótað tykkum út í. Uha – tað sær heldur ikki for gott út við tí.

Kamban, penganeyð, viðurkenning og lygn

Eg fari beinanvegin at siga, at tá ið Hanus Kamban sigur í grein frá 13. september í bløðunum, og eg siteri:

Sum støðan er í Føroyum í løtuni, hava listafólk einki stað, hagar tey kunnu senda sínar umsóknir, t.e. ongan virkandi mentunargrunn. (Sitat endað)

Hetta er ikki satt, tí júst nú hevur Mantunargrunnur Føroya Løgtings havt fund og stuðla fleiri mennandi og góðum listafólkum! At Hanus Kamban so ikki hevur fingið nakað frá grunninum, ja tað er bara harmiligt! Og Fjølrit er eisini virkandi grunnur, sum stuðlar!

Nú lastar og niðurgerð hesin Hanus Kamban alt virksemi hjá Mentunargrunni Føroya Løgtings seinastu 22 árini, og sigur, at hann hevur skrivað (citat): so at siga lønarleyst!

Ikki fyrr enn fyri fáum døgum síðani fekk eg at vita, at hesin sami Hanus Kamban er hin sami Hanus Andreasen, og er mín spurningur tí til henda mann:

Hvør hevur onga løn fingið - Hanus Kamban ella Hanus Andreasen?

So nýtur Hanus Kamban eitt dømi við júst heiðraða rithøvundanum Jóanes Nielsen, sum verður tikin fram sum pengamaskina, og sigur um seg sjálvan livandi í oyðimørk, og eg siteri: Hjá mær, eins og hjá teimum flestu í mínum bólki, er støðan tann øvuta. (Sitat enda) Og vit kunnu leggja aftrat, at støðan hjá Hanusi Kamban er tann øvuta tí hjá Jóanesi Nielsen!

Tá ið Hanus Kamban sigur, at eg sum skrivandi maður livi í somu oyðimørk sum hann og sama »bólki«, so skal eg upplýsa mentamálaráðharranum, at tað geri eg ikki! Frá 1994 og til dagin í dag gav eg 8 bøkur út! So eg veit ikki, hvønn »bólk« Hanus Kamban sipar til, men tað kann hugsast at verða bólkurin við Hanusi Kamban, Róa Patursyni, Ebbu Hentze og øðrum landskassariknum høvundumum í Havn, sum ikki hava annað at skriva um enn onnur, sokallaðir limir í Interrós?!

Og eg fari eisini at viðmerkja nýggju kunngerðina til Mentunargrunn, tá ið hon verður kunngjørd, tí tá henda nýggja skipan kemur í gildi, tá verður ikki tespiligt hjá okkum høvundum sum búleikast uttan fyri Havnina! Tá ið Hanus Kamban skal fáa 3 ára legat úr Mentunargrunninum uppá 700.000 krónur, tá verður ikki nógv eftir í grunninum at stuðla øðrum við, tað sigur seg sjálvt!

Nú sigur kanska onkur, jamen øll skrivandi hava møguleika at søkja um 3 ára legat. Men øll hava ikki møguleika at fáa tað! Tá ið »bólkurin« hjá Hanusi Kamban kemur framat nýggja Mentunargrunninum saman við Mentamálastýrinum, tá er einki sum eitur rithøvundur á bygd longur!

Lesi svarið frá nýggja mentamálaráðharranum í Dimmu leygardagin til henda sama Hanus Kamban, so síggja tit hvønn veg tað gongur! At ein mentamálaráðharri orðar seg soleiðis á so ódiplomatiskum støði, sum Torbjørn Jacobsen ger, sigur mær sera nógv! Og eg taki ikki hædd fyri, at nýggi mentamálaráðharrin júst hevur tikið við starvinum sum landsstýrismaður, tí Torbjørn Jacobsen veit væl, hvør ætlanin er við nýggja Mentunargrunninum! Seinastu tíðina hava jú fullveldis skaldini fingið stórar peningaupphæddir frá landsstýrinum, og hetta bara stendur við og versnar so hvørt Mentamálastýrið og mentamálaráðharrin koma meiri og meiri inn í mentanina!

Og ikki at gloyma Útvarps- og Sjónvarpsnevndirnar, sum settar vórðu herfyri av táverandi mentamálaráðharra og Mentamálastýrinum, men sum seinni vórðu avdúkaðar, tíbetur!

Hetta er fullveldis gongdin á mentunarliga økinum, men henda gongd er ikki bert galdandi innan fyri mentan, hetta verður framtíðin á øllum økjum!

At enda fari eg at spyrja mentamálaráðharran, um Hanus Kamban hevur gjørt nakra avtalu við mentamálaráðharran um at fáa stróran fullveldis stuðul, tí soleiðis er orðaljóðið og andin bæði í brævinum hjá Hanusi Kamban og aftursvarinum hjá mentamálaráðharranum?

Ólavur í Beiti
rithøvundur

Lesið eisini Sosialin
á Internetinum
www.sosialurin.fo

Aftur til ta› natúrliga

Bjørn Patursson er føroyskur limur í arbei›sbólkinum, sum kunnar um vistfrø›iligan landbúna›

Mynd: Edvard Joensen

Kunningarfundur um vistfrø›iliga framlei›slu var t‡sdagin á Búna›ardeplinum í Kollafir›i. Sagt var› frá ymsum møguleikum innan vistfrø›iligan landbúna›

Edvard Joensen

Kollafir›i: Føroyingar eiga at gera meira vi› vistfrø›iliga framlei›slu, halda summir búna›armenn. Eisini í Føroyum eigur at ver›a gjørt meira vi› hesa framlei›slu.

Vistfrø›iligur landbúna›ur er stutt og greitt at brúka ta›, natúran gevur. Vanlig tø› heldur enn handilstø› og so framvegis.

A›rasta›ni ver›ur alt møguligt dyrka› vistfrø›iligt. Til dømis var› bo›i› vistfrø›iligt kaffi á kunningarfundinum.

Ta› er eitt felags útnorrønt samtak, sum stendur fyri hesi kunningarverkætlanini, sum nú er farin í gongd. Nora (Nordisk Atlantsamarbejde) stu›lar verkætlanini.

Meginfelag Búna›armanna, MBM, hevur tiki› stig til tiltaki›. Eirikur Torvaldsson, stjóri í MBM, seg›i, at ta› var eftir fyrispurning, at MBM yvirhøvur fór undir at arbei›a vi› evninum.

Onnur lond hava fastan málsetning fyri, hvussu nógva vistfrø›iliga framlei›slu, tey skulu hava. Føroyingar hava einki, seg›i hann. Ta› var ikki nóg gott, var› mett, og tí er MBM fari› upp í hetta samstarvi›, sum nú er fingi› vi› Ísland og Grønland.

Gunnar Á. Gunnarsson stjóri á Íslendska kanningarstovninum TÚN, seg›i, at ta› er heilt natúrligt, at føroyingar, íslendingar og grønlendingar ganga saman um hesa verkætlanina. Hesi londini hava vi›urskifti, bæ›i landbúna› og onnur, sum líkjast rættiliga nógv.

Vit eiga at ásanna, at vit eru lítil í altjó›a høpi og ikki ganga so nógv eftir nøgd heldur enn eftir dygd.

Vit brúka luttvíst minst líka nógv kunsttø› og sproytuevni, sum onnur lond. Men vit standa langt aftan fyri eyropeisku londini, tá talan er um vistfrø›iliga framlei›slu, Og ta› kunnu vit ikki lata sita á okkum, helt hann.

Vit standa fyri vaksandi innflutningi a›rasta›ni frá, seg›i Gunnar Á. Gunnarsson. Har er nógv vistfrø›ilig vøra ímillum. Og brúkarin gerst alt meira tilvitandi. So skulu vit vera vi› í tí kapping, sum her ver›ur, er ney›ugt, at vit eisini dyrka okkara egnu vistfrø›iligu vørur.

Men ta› stendur heldur ikki so heilt illa til vi› vistfrø›ini í Føroyum kortini. Tann føroyska landbúna›arvøran, føroyingar eta mest, er kanska sey›akjøt. Og ta› er sanniliga vistfrø›iligt, helt stjórin á Royndastø›ini, Peter Haahr.

Verri stendur til vi› mjólkini, helt hann, og ásanna›i, at har er ney›ugt at gera naka› skjótt, um vit ynskja at selja vistfrø›iliga mjólk.

Spurningurin er so bara, hvat brúkarin ynskir, og her skal vinnan eisini vera vakin og duga at síggja, hvat markna›urin vil hava.

Ta› var rættiliga har›ført nor›an fyri mánakvøldi›. Fleiri ska›ar hendu, serliga har skri›ur lupu

Ein skri›a stongdi mánakvøldi› Elduvíkarvegin. Vegurin var stongdur eina løtu, men skjótt var koyrandi aftur.

Skri›an leyp úr fjallinum og fór heilt á sjógv. Menn frá Landverkfrø›inginum fóru beinanveg til arbei›is fyri at fáa lati› uppaftur, og ta› var hampiliga skjótt, at koyrandi var› aftur.

T‡sdagin vóru teir í gongd vi› at rudda, solei›is at millum anna› bilverjan, sum farin er, eisini kann gerast aftur.

Eisini í Oyndarfir›i var stórt skri›ulop, sum byrgdi vegin av. Hetta lopi› var væl størri enn ta› á Elduvíkarvegnum, siga teir hjá Landsverkfrø›inginum.

Í Nor›urstreymoy vóru eini fleiri lop. Á Víkar- og Tjørnuvíkarvegnum lupu skri›ur. Og í Saksun var rættiliga umfatandi lop. Har hendi eisini størri ska›ar á br‡r og úthús, eins og nógvur bøur liggur undir í runu og gróti.

ej

T‡sdagin vóru menn hjá Landsverkfrø›inginum og rudda›u eftir skri›ulopi á Elduvíkarvegnum

Mynd: Edvard Joensen